# Royna aftur at fáa kommunur í Suðuroynnni at leggja saman

**Tvøroyrar Býráð tekur enn einaferð stig til at fáa kommunur í Suðuroy til at leggja saman**

KOMMUNUSAMAN-LEGGING
*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*



*– Á Tvøroyri hava vit eina greiða meining um kommunusamanlegging og tí royna vit at fáa gongd aftur á málið, sigur Kristin Michelsen, borgarstjóri á Tvøroyri*

Tvøroyrar Býráð ger nú enn eina roynd at fáa kommunurnar í Suðuroy at leggja saman.

Í hesum sambandi hevur Tvøroyrar Býráð nú givið borgarstjóranum heimild til at skipa fyri fundi at tosa um kommunusamanlegging.

Kristin Michelsen, borgarstjóri, sigur, at sostatt er ætlanin nú at kalla saman til fundar at viðgera kommunala bygnaðin í Suðuroynni.

Hann sigur, at ætlanin er at skipa fundin sum eitt pallborð, har ætlanin er at fáa borgarstjórar norðanfjørðs, sum hava royndir av kommunusamanlegging, at vera við.

Hann hugsar í hesum sambandi um borgarstjórar í størri, samanløgdum kommunum. Men hann hugsar eisini um at fáa onkrar av gomlu borgarstjórunum úr kommunum, sum eru niðurlagdar, við á fundin.

Somuleiðis er ætlanin at fáa landsstýrismannin í innlendismálum, Jacob Vestergaard, við á fundin at greiða frá, hvørjar ætlanir landsstýrið hevur á kommunala økinum.

Annars ætlar hann at tað skulu vera borgarstjórarnir og skrivararnir í kommununum í Suðuroy, sum skulu vera við á fundinum.

### Lýsa fyrimunir og vansar

– Ætlanin við fundinum er at lýsa fyrimunir og vansar við eini kommunusamanlegging, sigur Kristin Michelsen.

Tað heldur hann, at borgarstjórar í samanløgdum kommunum og teir, sum vóru borgarstjórar í kommunum, sum ikki eru til longur, kunnu geva suðuroyingum eina greiða meining um.

Borgarstjórin fer nú at kanna eftir, nær tað liggur fyri at hava ein slíkan fund.

Hann sigur, at nógv hava saknað, at fyrimunirnir og vansarnir við kommunusamanlegging verða lýstir.

– Eftir ein slíkan fund er so bara at vóna, at hinar kommunurnar í Suðuroy taka málið upp og taka eina greiða støðu til eina kommunusamanlegging, so vit fáa at vita, hvussu støðan er í oynni til samanlegging, sigur Kristin Michelsen.

### Tað einasta rætta

Sjálvur ivast borgarstjórin á Tvøroyri ikki í, at tað einasta rætta er at leggja Suðuroynna saman í eina kommunu.

Tað er eitt sjónarmið, sum Tvøroyrar Býráð tekur fult undir við.

Og tað er eitt sjónarmið, sum eisini tvørafólk taka fult undir við, tí í nakað síðani varð skipað fyri fólkaatkvøðu á Tvøroyri um kommunusamanlegging og har varð úrslitið var, at ein heilt stórur meiriluti av tvørafólki vil hava at øll Suðuroyggin verður ein kommuna.

Eisini í Sumbiar Kommunu hevur fólkaatkvøða verið um kommunusamanlegging og har var úrslitið eisini, at ein greiður meiriluti av sumbingum vil hava alla oynna savnaða í eina kommunu.

Tað var eisini tann tíð, tá ið Tvøroyrar og Sumbiar kommuna arbeiddu fyri at leggja saman, men tey komu ikki á mál áðrenn tíðarfreistina fyri samanlegging í sambandi við kommunuvalið í 2004, varð úti og sostatt kom stígur í tað viðgerðina.

Í hinum kommununum í Suðuroy hevur fólkaatkvøða ikki verið um kommunusamanlegging.

Borgarstjórin á Tvøroyri vil helst, at øll Suðuroy verður ein kommuna.

Men eydnast tað ikki, skilst á honum, at hann eisini er opin fyri, at einstakar kommunur leggja saman fyri at fáa gongd á.

– Tað verður sagt, at kommunur, sum leggja saman, skulu vera landafrøðiliga samanhangandi, men vit síggja eisini dømi um norðanfjørðs, at kommunalt samstarv verður skipað tvørtur um sund og firðir, so tað letur seg gera hjá kommunum at leggja saman, hóast tær ikki beinleiðis eru grannakommunur, sigur borgarstjórin.

# Lemmatrolararnir sita eftir við ongum

**Tey, sum eiga lívið í livravirkinum á Eiði, fáa onki, nú nú landsstýrið er farið at lata virðisløn til tey, sum taka livur til virkið**

MISMUNUR
*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*



*Skip og bátar, sum taka livur til lands, fáa nú virðisløn. Men teir, sum eru raskast at taka livur, fáa ikki inn í eygað*

– Tað vísir seg sum um at vit eiga ongan góðan. Tá ið aðrir fáa virðisløn, fáa vit onki. Tá ið aðrir verða skerdir 2% verða vit skerdir 20%.

Mikkjal Hammer, skipari á Steintór í Hvalba er vónsvikin av teirri viðferð, sum lemmatrolararnir fáa frá landsins myndugleikum.

Hann vísir á, at tá ið fiskidagaskipanin varð ásett, vóru fiskidagarnir skerdir 2%. Men hjáveiðikvotan hjá lemmatrolarunum á innaru leiðunum varð skerd heili 20%.

Og nú hevur landsstýrið eisini lýst við, at teir bátar, sum taka livur til livravirkið á Eiði, skulu fáa eyka fiskidagar.

Men tað er bara galdandi fyri tey skip, sum eru í fiskidagaskipanini.

Tað eru lemmatrolararnir ikki og sostatt fáa teir heldur ongan ágóða av hesum.

Hetta kann tykjast sum ein stór andsøgn, tí tað eru nettupp lemmatrolararnir, sum hava tikið mest livur.

– Og skiparin á Steintór dylir heldur ikki fyri, at teir eru vónbrotnir av hesum.

– Tað eru lemmatrolararnir, sum avreiða nógv mest av livrini, sum virkið á Eiði fær og tí eru vit vónbrotnir av at vit slett ikki koma upp í part, nú landsstýrið býtir virðislønir út til tey skip, sum taka livur, sigur Mikkjal Hammer.

Hann vil kortini ikki siga, hvussu hann heldur, at lemmatrolararnir skulu fáa ein ágóða fyri at taka livur.

– Tað er eitt útspæl, sum eigur at koma úr Fiskimálaráðnum heldur hann.

Hann sigur, at tað vísir seg sum um at lemmatrolararnir ongan góðan eiga, tí hesi seinastu tiltøkini hjá landsstýrinum vísa, at teir skulu rakast nógv harðari enn aðrir skipabólkar.

### Eiga lívið í virkinum

Egil Olsen á livravirkinum á Eiði kann ikki annað enn staðfesta, at tað eru lemmatrolararnir, sum at kalla eiga lívið í livravirkinum.

– Eini 75-80% av teirri livur vit taka ímóti, fáa vit frá lemmatrolarunum. Samstundis hava summr av teimum sett partapening í virkið, so eg skilji væl, at teir eru ónøgdir, sigur hann.

Tí heldur hann at tað var ikki annað enn natúrligt, at teir eisini fingið onkran ágóða, nú landsstýrið kortini letur teimum viðurkenning, sum taka livur.

– Vit eru ómetaliga takksom fyri tann stuðul, sum vit fáa frá lemmatrolarunum, tí teir eru ein týðandi partur av grundarlagnum undir virkinum, sigur hann.

Egil Olsen sigur, at fyri tað, um lemmatrolararnir ikki eru í fiskidagaskipanini, kundu teir fingið nakrar fiskidagar á innaru leiðum, ella landsstýrið kundi egnt teir við eini eyka hjáveiðikvotu.

Hann sigur at garnabátarnir eru í somu støðu. Teir taka livur, men eru ikki í fiskidagaskipanini og fáa tískil heldur onga viðurkenning fyri tað.

### Bar ikki til

Bjørn Kalsø, landsstýrismaður fegnast um, at lemmatrolararnir eru so raskir at taka livur. Og tá ið spurningurin var til viðgerðar um at lata virðisløn til tey skip, sum taka livur, varð eisini nógv tosað um lemmatrolararnar.

– Men av tí, at teir vóru uttanfyri fiskidagaskipanini, bar ikki til at fáa teir upp í skipanina, sum gevur virðisløn til teir, sum taka livur.

Hann sigur, kortini hann hugsaði nógv um lemmatrolararnar, tá ið skipanin við eykadøgum til teir, sum taka livur, varð til viðgerðar.

– Men úrslitið bleiv so, sum tað bleiv.

Er tað ikki órættvíst, at teir, sum taka nógv mest livur, ikki eisini fáa onkra viðurkenning fyri tað.

– Hetta er fyrst og fremst ein skipan fyri tey, sum eru í fiskidagaskipanini og tí ber ikki til at geva lemmatrolarum somu sømdir. At geva teimum eyka kvotu, er ikki so lætt, tí bæði Fiskifrøðingar og Fiskidaganevndin mæla til at teir skulu missa alla hjáveiðikvotuna á innaru leiðum. Tað vildi landsstýrið kortini ikki, men skerdi hana eitt sindur.

Hann sigur kortini, at arbeitt verður framvegis við ætlanini at fáa lemmatrolararnar undir fiskidagaskipanina. Koma teir tað, kunnu teir koma upp í part til at fáa virðisløn fyri at taka livur.

Tí varð gjørt av at gera skipanina, sum hon er í fyrstu syftu og so fáa vit at síggja, hvussu gongst at fáa lemmatrolararnar upp í fiskidagaskipanina.